HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

## *Matvørudeildin lýsir eftir akademikara*

### *Arbeiðsuppgávurnar*

Arbeiðsuppgávurnar fevna um alt vanligt virksemi, sum gongur fyri seg á matvørudeildini, so sum:

- málsviðgerð
- eftirlit á fiska- og matvøruvirkjum
- skoðan av innaneftirlitsskipanum
- fakligar metingar og ráðgeving
- annað

Serliga økið starvið fevnir um er:

- góðkenning og løggilding av matvørueindum, íroknað løggilding av fiskiskipum
- málsviðgerð í sambandi við góðkenning av innaneftirlitsskipanum
- eftirlit við góðkendum og løggildaðum matvørueindum, herundir fiskiskipum, vatnverkum smásølur við og uttan virking, matstovum, stovnskøkum, pylsu/grill/mobilar eindir og bygdarhús

### *Krøv til útbúgving og førleika*

Akademiskt prógv á kandidat ella BSc. støði innan náttúruvísindi, so sum matvørufrøðingur, djóralækni, Cand. scient ella tilsvarandi útbúgvingar frá hægri lærustovnum.

Umsøkjarar við viðkomandi starvsroyndum hava fyrimun.

Vit sóknast eftir fólki við áræði og framfýsni at náa settum málum og sum:

- megnar at vísa og fasthalda yvirlit í eftirlitsarbeiðinum og tá á leikar
- sær nýggjar arbeiðsuppgávur sum eina spennandi avbjóðing
- kann arbeiða sjálvstøðugt, men samstundis vera liðleikari
- dugir væl at samstarva
- hevur góð evni at samskifta við onnur, bæði í skrift og talu
- hevur koyrikort til bil
- hevur kunnleika til framkomnar edv skipanir

Vit bjóða:

- spennandi og sjálvstøðugt arbeiði á eini deild við engageraðum starvsfólki í einum tvørfakligum arbeiðsumhvørvi
- eitt arbeiði í samstarvi við vinnuna og aðrar myndugleikar
- nýggjar avbjóðingar
- støðuga førleikamenning
- gott arbeiðsumhvørvi

Falkavegur 6, 2. hædd
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. **+298 556 400**
Fax. **+298 556 401**
E-mail: hfs@hfs.fo
Homepage: http:\\www.hfs.fo

### *Tíð og setanarviðurskifti*

Starvið er fulla tíð og verður sett sambært sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið, sí www.lnd.fo. Umsóknir við avriti av prógvi, CV, viðmælum o.t. skulu verða Heilsufrøðiligu starvsstovuni í hendi í seinasta lagi týsdagin hin 2. mars 2010.

Stutt um matvørudeildina:
Á matvørudeildini starvast íalt 11 fólk. Deildin tekur sær av:

- góðkenning av og eftirlit við matvøruvirkjum (íalt er talan um eini 600 góðkenningareindir)
- inn- og útflutningi av matvørum
- fakligur ráðgevi í kunngerðararbeiði
- yvirvøku- og annað eftirlitsarbeiði
- veterinerum uppgávum, sum náttúrliga hoyra til á matvørudeildini.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Lailu Jacobsen, settan deildarleiðara, tel. 556419, ella Bárð Enni, stjóra, tel. 556400.